

Mynd: Rógvi Mouritsen

við føstum millumbilum og goyma mátingarnar saman við positiónini. Eftir umleið hálvum øðrum ári koma tær upp til vatnskorpuna og senda úrslitini yvir fylgisvein til lands.

– Øll henda mátiútgerðin er dýr, og vit gera hesar mátingar í samstarvi við fleiri granskingarstovnar í Evropu og USA við figging úr ymiskum útlendskum granskingargrunnum, sigur havfrøðingurin.

Aftrat nevndu mátingum, verða mátingar av sjóvarhita eisini gjørdar við Oyrargjógv á Vágoynni og á Lívfiskastøðini í Skopun.

– Hesar mátingar verða eisini gjørdar við sjálvvirkandi útgerð, leggur hann aftrat.

### Broytingar

Bogi Hansen sigur, at nógvu mátingarnar siga okkum nógv ymiskt um sjógvin kring Føroyar, og hvussu ymisk viðurskifti í sjónum kunnu ávirka lívið í honum.

– Eitt nú síggja vit, hvussu sjógvurin kring Føroyar er broyttur, síðan vit fóru í holt við at gera hesar mátingar.

Í seinastu ársfrágreiðing hjá Fiskirannsóknarstovuni vísti stovnurin á, at sjógvurin inni við land í 2003 var heitari, enn hann hevur verið, síðan hitamátingar byrjaðu við Føroyar í 1914. Í so máta líktist árið 2004 nógv árinum fyri, tó at sjógvurin inni við land kanska kólnaði eitt vet.

Mátingarnar vísa eisini, at sjógvurin inni við land er feskari enn úti á, og hetta kemst av, at tað regnar meira yvir landi.

– Men høvuðsgongdin hesi seinastu árini er tann sama á grunnum sum á djúpum, sigur Bogi Hansen, havfrøðingur.

# Fleiri línuskip skifta eigara

**– Tað eru fleiri, sum spyrja, um vit ætla at selja, nú tað ljóðar, at vit umhugsa at selja partabrøvini í felagnum, sum eigur Núp, sigur reiðarin, Erling Petersen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv skip eru seld seinastu tíðina, og ikki minst er talan um línuskip.

Um ársskiftið skifti Morgunstjørnan eigara, og herfyri skiftu bæði Grani og Fugltúgvan eigara.

Herfyri ljóðaði eisini, at teir, sum eiga línuskipið Núp í Klaksvík, eisini umhugsa at selja.

Reiðarin, Erling Petersen, sigur, at átta partaeigarar eru í Núpi, sum felagið, P/F S.J.G., eigur.

### Fleiri spyrja

– Nú tað hevur ljóðað, at vit umhugsa at selja partabrøvini, hava fleiri áhugaðir keyparar vent sær til okkara.

Reiðarin sigur, at enn hava partaeigararnir ikki tikið nakra endaliga støðu til sølu, men hann vísir á, at tað kann hugsast, at ein avtala kemur upp á pláss seinni í hesi vikuni.

Erling sigur, at teir, sum eiga skipið, ikki hava lýst tað til sølu alment, og hann dylur ikki, at eigararnir við eini møguligari sølu helst vildu sæð, at skipið framhaldandi verður verandi í Norðoyggjum.

Felagið, P/F S.J.G. er stovnað í 1992.

### Einar 14 miljónir

Tey línuskip, sum seld eru seinastu tíðina, hava ligið um einar 13-14 miljónir krónur, og sum skilst á teimum, sum eiga Núp, vænta teir, at prísurin fyri skipið fer at liggja um hesa leiðina.

– Men enn kann eg sum nevnt einki siga um, hvussu verður, tí enn er einki avgjørt, sigur reiðarin, Erling Petersen.

## FAKTA UM NÚP

**Bygdur:** 1959
**Smíðistaður:** Søviknes, Noreg
**Tilfar:** Stál
**Longd:** 38,19 m
**Breidd:** 7,49
**Dýpd:** 6,24
**BT:** 354
**Maskinslag:** Callesen Diesel (1987)
**Maskinorka:** 633 hk
**Eigari:** P/F S.J.G.
**Útgerðarmaður:** Erling Petersen

*Kelda: Skipalistin*



*Fleiri línuskip eru seld seinastu tíðina, og nú er upp á tal, at partabrøvini í Núpi eisini verða seld. – Men enn er eingin støða tikin, sigur reiðarin, Erling Petersen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*